Tiltøk

Rhema, Tórshavn
Mikukvøld kl. 20: Møti.
Sunnudagin kl. 10.30: Morgunmøti.

Meinigheitshúsið, Tórshavn
Sunnukvøldið 14. juli kl. 18: Møti v/ teimum fýra: Tummas, Enok, Kristoffur og Sverra.
Týskvøldið 16. juli kl. 20: Bíbliutími um Kol. 2 v/ Klæmint Tausen.

KFUM
Hoydalsvegur 6, Tórsh.
Í sambandi við at Óluva Laksá fer út aftur sum trúboðari, bjóðar Santalringurin til samkomu í KFUM sunnukvøldið 14. juli kl. 20, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Samkoman Sion, Vágur
Morgunmøti.
Sunnukvøld kl. 18.00: Evangeliskur fundur.
Mánakvøld kl. 20.00: Bønarfundur.
Hóskvøld kl. 20.30: Bønarfundur.
Forbønartænastan svarar á tlf. 73941 bæði kvøldini meðan bønarfundur er.
Telefonandaktin: 73777.

Keldan í Skálafirði
Opið hús verður leygarkvøldið kl. 21 v/ Paula Høj.
Sunnukvøldið kl. 19 møti. Rasmus Frederiksberg og fleiri skipa fyri.

Lívsins Orð
Barnamøti hósdag kl. 17.30 í Stokkastovuni. Øll børn eru vælkomin.
Evangeliskt møti hóskvøld kl. 20 í Stokkastovuni.
Møti sunnumorgun kl. 10.30 í Stokkastovuni.
Øll eru vælkomin.

AA-fundir
í kvøld kl. 20 á Vaskarínum, og kl. 22.30 í Uppistovu.

Felagið Føroyar-Kuba
Opið er mikudagar frá kl. 16–18.
Telefon 13016 - Fax 13824.

Barnabati
Veitst tú, at
– Barna- og Ungdómstelefonin svarar hvønn mánadag frá kl. 16 til 18?
Tlf. nr. er 10645.
Foreldur kunnu eisini ringja og fáa ráðgeving.
Tey, ið svara, hava tagnarskyldu.
Tú kanst vera anonymur.
Hvat kanst tú ringja um?
– Persónligar trupulleikar av øllum slag, t.d. incest, anorexia ella bulimi, alkohol, fyribyrging, royking o.m.a., ella bara hava brúk fyri at tosa við onkran vaksnan.

Evangeliska Røddin
Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Kristnastova
Birmavej 36, København S, tlf. 31 55 18 09 / fax 31 58 61 49.
Fríggjakvøldið kl. 20 er kristiligur fundur. Sunnumorgunin kl. 11 er samkomufundur við breyðbróting og sunnudagsskúli kl. 12.30.

Eliaskirkjan
Vesterbrogade 49, København
Í summar verða fundir annanhvønn leygardag kl. 19, tann 13. juli, 27. juli og 10. august.
Bussarnir 1, 6, 16, 28 og 41 steðga nærhendis.
Lýst verður tá sunnudagsskúlin byrjar aftur í august.
Tlf. 32886727 / 36789046

Malta, Hirtshals
Sunnudag:
kl. 11: Breyðbróting.
kl. 13: Sunnudagsskúli.
kl. 18: Evangeliskur fundur.
Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti.
2. hóskvøld kl. 19 í hvørjum mánaði eru vit í Hygum.
2. friggjadag í hvørjum mánaði kl. 19.30 eru vit í Esbjerg.
2. leygardag í hvørjum mánaði kl. 19.30 eru vit í Sønderborg Skolehjem, Sønderlandevej 28, Sønderborg.
Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti.
Samkoman Malta í Hirtshals

Føroyahúsið í Keypmannahavn
Vesterbrogade 17 A
Tlf. 31 23 15 87, kunningartelefon, ið sigur frá tiltøkum og fax á tlf. nr. 31 23 15 86
Kaffistovan er opin hvønn dag frá kl. 15–19.
Leygardag er opið í mai og juni kl. 10–14 við barnaansing.
Hvønn mánadag kl.17–19 er føroyskt sjónvarp á bandi við Degi og Viku og døgurði fæst til keyps.
Ullvørur, bøkur, fløgur og bond og døgurðamatur fæst til keyps.
Føroyahúsið er stongt 6.–21. juli.

Føroyingafelagið í Aalborg
Felagið er farið í summarfrí. Latið verður uppaftur 31. august kl. 22.00.

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danm.
Afturlatið er vegna summarfrí í tíðarskeiðnum 27. juni til og við 22. juli.

Føroyingar í Noregi
Føroyingar og fólk við tilknýti til Føroyar hittast til óformligan hugna fyrsta leygardag í mánaðinum á Kafé Asylet, Grønland 28, í Oslo.
Norsk-Færøysk Lag skipar fyri tiltakinum.
Felagið hevur tlf. +47 22 67 48 29 *(nýtt)*

Brúdleyp

Leygardagin 13. juli kl. 16.00 giftast í Tvøroyrar kirkju Jean P. R. Johansen og Sigrid Dalfoss, bæði av Tvøroyri.
Brúdleypsadr.: Ítróttarhøllin í Trongisvági.

Leygardagin 13. juli kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Maibritt Svabo Hansen og Rói Egholm, Tórshavn.
Opið hús verður í Hagagøtu 6 á Argjum frá kl. 20.30.

Leygardagin 13. juli kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Ansa Simonsen, Viðareiði, og Bergur Viderø, Sandi.
Opið hús verður frá kl. 21.30. Øll eru vælkomin.
Brúdleypsadr.: HB-húsið.

20. juli giftast í Glyvra kirkju Heidi Hansen, Saltangará, og Búgvi E. Jacobsen, Søldarfirði.
Vælkomst verður í Ólastovu kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið á hesum degi, biðjast vinarligast um at ringja tlf. 47537 í seinasta lagi 10. juli.

20. juli kl. 16.00 giftast í Eiðis kirkju Eyrun Kruse og Evald Suni í Kollsbirgi.
Brúdleypið verður hildið í EB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, verða biðin um at siga frá á tlf. 23264 ella 23077 innan 14. juli.

Leygardagin 20. juli kl. 14.00 giftast í Fuglafjarðar kirkju Rannvá Dahl Jacobsen og Claus Benzon Widstrup.
Vælkomst verður í Lonini kl. 19.30. Tey, ið vilja gleða okkum á hesum degi, verða vinarligast biðin um at siga frá á tlf. 44096 áðrenn 15. juli.

Leygardagin 27. juli giftast í Fuglafjarðar kirkju kl. 16.00 Hallbjørg Højgaard, Runavík, og Hermund Hansen, Fuglafirði.
Vælkomst verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, sum vilja gleða okkum á hesum degi biðjast vinarligast siga frá á tlf. 44352, 44128 ella 47527 áðrenn 15. juli.

Fleiri deyðfødd

Í fjør vórðu seks børn deyðfødd í Føroyum.
Hetta er nógv meira enn undanfarnu árini og gevur ein títtleikatal upp á 9,2 promillu av øllum føddum børnum.
Árið fyri vóru trý børn deyðfødd, og hetta árið var títtleikin av deyðføddum 4,5 o/oo.
Hetta er nógv samanborið við hini norðurlondini. Í 1994 lógu Føroyar og Noreg á odda vi 4,5 o/oo. Viðmerkjast skal tó, at talið av deyðføddum í Føroyum er so lágt (6 í fjør), og tí kann títtleikin broyast nógv frá einum ári til annað.


Færri abortar
Aftur fyri liggja Føroyar lægst av norðurlondum, tá ræður um abortar. Í fjør vórðu gjørdir 53, tað sama í 1994. Størst var talið í 1989, tá 95 kvinnur fingu fosturtøku í Føroyum.
Flestu fosturtøkurnar verða gjørdar á Landssjúkrahúsinum. Í fjør vórðu 50 av 53 gjørdar á Landssjúkrahúsinum, tríggjar á Suðuroyar Sjúkrahúsi, og eingin á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

KASSAR TIL SØLU
Vælumtóktu 300 ltr. isoleraðu smábátakassarnir v/ loki eru á goymslu nú. Ring um nærri upplýsingar.




Hugsar tú um at keypa ella selja bát
Vinarliga ring ella send okkum eitt fax
BÁTASØLAN
Sundsvegur 11, FR-100 Tórshavn
Tlf. 17789, Fax 16789
Fartlf. 88910 / 87910

HAVNAR BIO
★ Tlf. 11956 ★



Frumsýning
Friggjadagur 12.07. kl. 20[30]
Leygardagur 13.07. kl. 20[30]
Sunnudagur 14.07. kl. 19[30]

Billetprísur: 55 kr.
Friggjadagur 12.07. kl. 23[30]
Leygardagur 13.07. kl. 23[30]
Sunnudagur 14.07. kl. 22[15]



Frumsýning
Friggjadagur 12.07. kl. 20[00]
Leygardagur 13.07. kl. 20[00]
Sunnudagur 14.07. kl. 19[00]

Billetprísur: 55 kr.
Friggjadagur 12.07. kl. 22[30]
Leygardagur 13.07. kl. 22[30]
Sunnudagur 14.07. kl. 21[00]



Kemur fríggjadagin 19.07.